# Kjak



**Kitty May Ellefsen**
*Løgtingskvinna fyri Fólkaflokkin*

# Á veg móti einum sjálvberandi búskapi

*Vit í Fólkaflokkinum arbeiða miðvíst móti at Føroyar skulu fáa ein sjálvberandi búskap. Tann sjálvberandi búskapurin skal byggja á fleiri ymiskar vinnur, sum skapa avkast og framburð í samfelagnum. Í stuttum snýr tann sjálvberandi búskapurin seg ikki um annað enn, at vit í Føroyum skulu klára at húsast*

Vit eru á veg móti einum meira fjøltáttaðum búskapi soleiðis, at fleiri bein verða hjá samfelagnum at standa á. Tað at byggja alt samfelagið á eina vinnugrein, sum gjørt hevur verið við fiskivinnuna seinastu øldina, gevur eitt ótrygt grundarlag, tí samfelagsbúskapurin alla tíðina fylgir fiskaprísunum. Hetta merkir sjálvsagt ikki, at vit ikki skulu menna fiskivinnuna, tvørturímóti, skulu vit allatíðina menna fiskivinnuna soleiðis, at lønsemi í vinnuni allatíðina økist.

## Alivinnan gjørdi tað

Alivinnan er eitt dømi um, hvussu gagnligt tað er at spjaða álitið á búskapinum út á fleiri vinnur.

Meðan tað hevur gingið illa hjá meginpartinum av fiskivinnuni, byggivinnuni og handilsvinnuni seinastu árini - so hevur alivinnan blóma.

Tað er alivinnan ið hevur bjargað útflutningsvirðinum frá at minka enn og meira. Framleiðslan í alivinnuni er meira enn trífaldað frá 2006-2009. Sama tíðarskeið er útflutningurin av alilaksi farin úr 12% upp í 31% av samlaða útflutningsvirðinum frá 2007 til 2009.

At alivinnan hevur klára seg so væl skyldast sjálvsagt, at vinnan hevur klára, at draga bestu fólkini til sín og at vinnan hevur klára at bjóða góð og mennandi arbeiðskor. Tó hevur tað almenna Føroyar eisini spælt sín leiklut. Tað almenna hevur tryggja vinnuni støðugar karmar soleiðis, at vinnan eisini hevur klára seg stak væl í altjóða kapping.

## Vit eigar ikki at leggja eyka byrður á vinnur bara tí hesar klára seg væl

Tað er kanska freistandi hjá politikkarum, sum arbeiða við, at fáa fíggjarlógina at hanga saman, at leggja eykað gjøld á vinnur, sum klára seg væl. Men hetta er ikki rætt – og hangur ikki saman við høvuðsregluni í vinnulæruni, sum sigur, at vinnan skal hava tryggar og stabilar karmar at virka undir.

Í staðin fyri at leggja alskyns gjøld á hesar vinnur eiga vit heldur at hugsa um hvussu vit kunnu økja um hesar vinnur. Tá talan er um alivinnuna arbeiður Fiskaaling við eini verkætlan um aling á havinum. Verður verkætlanin til veruleika kann aling á havinum vaksa enn meira um føroysku alivinnuna.

## Spýrar til aðrar vinnur

Tað eru fleiri spýrar til aðrar vinnur í føroyska samfelagnum í dag.

Vit eiga tildømis at fáa meira burturúr shipping vinnuni. Vit hava heimsins bestu sjófólk og eisini góðar skúlar á økinum, sum vit kunnu bjóða fram uttanlanda.

Ferðavinnan er eisini ein vinna, sum vit eiga at satsa uppá. Tá flogvøllurin verður longdur og flúgvast kann beinleiðis til fjarðskotin lond verða møguleikar eisini latnir upp fyri at fleiri ferðafólk koma at vitja oyggjarnar.

Fleiri føroyskir íverksetarar arbeiða eisini við spennandi verkætlanum innan orku økið. Tað hevur stóran týdning at hesir fáa bestu sømdir og kor at arbeiða undir.

Sjálvt um tíðirnar seinastu tvey árini hava verið merktar av búskaparkreppu so eiga vit at arbeiða fram ímóti einum sjálvberandi búskapi, ið byggir á fleiri ymsikar vinnur, sum skapa avkast, framburð og vælferð. Hetta eigur at verða gjørt nógv meira tilvitað enn higartil.

# Kunnu vit siga nei?

Hann er 40 ára gamal, giftur, stjóri og harðliga ímóti fríari fosturtøku í Føroyum. Fyri 16 árum síðan var hann saman við eini tá 17 ára gamlari gentu. Hítan skrædnaði og tvær strikur komu á graviditetstestina. Tað, sum hann ikki visti, var, at gentan var dóttir ein arbeiðsleysan einkjumann, sum var farin undir miðnámsútbúgving, fyri betur at kunna uppihalda sær og dóttrini í framtíðini. Pápi gentuna fekk tí bert kr. 5237,00 um mánaðin, sum var akkurát nokk til lán, mat og rokningar.

Nú vóru góð ráð dýr. Hon ynskti sær fosturtøku, men landið loyvdi tí ikki, og til ferðaseðil til Danmarkar var ikki peningur. Og Jógvan kom óynsktur í heimin. Einki pinkubarnaheim er í landinum, og tí skifti smádrongurin millum onkrar egnaðar og onkrar óegnaðar fosturfamiljur kring landið. Skifti ofta skúla, bleiv happaður o.s.fr.

Jógvan er hart merktur av hørðu barnaárunum, og hevur nógvar løtur, har hann ikki hevur hug at liva. Men tað vóru fólkini í Føroyum, sum vildu hava hann at liva. Men hvar vóru tey, sum hildu seg bjarga hansara lívi í móðurlívi, tá hann hevði brúk fyri hjálp?...

SU er fyri einum samfelag, har vit ikki hava tørv á fríari fosturtøku. Einum samfelag, har ØLL hava atgongd til vælferðina. Raðfestið stuðul til lesandi, útbúgving til stakar uppihaldarar, barnaheimið, fólkaskúlan og økið krøvini til pápar, ið ikki eru um barnið! Áðrenn vit gera hetta kunnu vit ikki nokta fríari fosturtøku.

**Sosialistisk Ung Føroyar**

